# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*»Hetta er ræðuligt. Vit skuldu havt vunnið í tí ordiliga dystinum, og so høvdu vit fingið eina dreymafinalu ímóti Týsklandi frammanfyri 19.000 áskoðarum.«*

Peter Henriksen við TV2

Kyndil-VÍF:

## Kyndil skal helst vinna

**Klassikarin í føroyskum manshondbólti verður á skránni leygardagin, tá ið Kyndil tekur ímóti VÍF. Kyndil skal helst vinna dystin fyri at leggja trýst á StÍF á øðrum plássi, meðan VÍF kann leggja sjógv niður til Kyndil, um teir vinna dystin**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Verður tosað um nakran klassikara í føroyskum manshondbólti, so er talan sjálvandi um dystirnar ímillum Kyndil og VÍF. Kappingin ímillum hesi bæði liðini hevur verið sera stór síðstu árini, tí at liðini aloftast hava ligið og kappast um fremsta plássið, og tí er hesin dysturin blivin róptur fyri klassikarin.

Hjá gestunum úr Vestmanna hevur gingið sum eftir ánni í størsta partinum av árinum. Teir hava spælt seg í finaluni í Coca Colakappingini, og í landskappingini hava teir ligið fremst í nógvar vikur.

Hava úrslitini verið góð ígjøgnum kappingarárið, so hava vestmenningar ikki fingið so nógv burtur úr í endaspælinum. Av fyrsta fýra dystunum hava teir fingið fimm stig, so nú skulu teir royna at økja enn meir um úrtøkuna, tá teir vitja hjá Kyndli.

Gongdin hjá Kyndli hevur verið júst øvugt av gongdina hjá vestmenningum. Kyndil fekk eina ræðuliga byrjan uppá kappingarárið, og eitt skifti lógu teir eisini aftast í grundspælinum. Teir komu tó spakuliga fyri seg, og undan vetrarsteðginum høvdu teir vunni øseg uppá fjórða pláss.

Í fyrsa dystinum í endaspælinum taptu teir so fyri H71 og so máttu teir aftur ein túr niður á aftasta plássið, men eftir hetta hava teir veruliga fingið gongd á. Tveir sigrar og ein javnleikur hava ført við sær, at Kyndil nú hevur ein erligan møguleika at blanda seg í stríðið um annað finaluplássið.




*Kyndil skal helst vinna dystin fyri ikki at missa kontaktina við ovaru liðini. VÍF skal eisini helst vinna dystin fyri ikki at gera oddastríðið óneyðuga spennandi.*

### Kyndil hevur fysta sigurin til góðar

Kyndil og VÍF hava møtt hvørjum øðrum tvær ferðir fyrr í ár. Fyrsti dysturin var eisini allar fyrsti dysturin á árinum, tá liðini møttust í Vestmanna. Henda dystin vunnu vestmenningar tepurt.

Var nógvur spenningur í fyrra dystinum, so var klassamunur í seinina dystinum í grundspælinum. Her bukaðu vestmenningar snøgt sagt Kyndil av, so nú skal Kyndil royna at hevna tey bæði tapini.

Sum Kyndil hevur spælt síðstu dystirnar, so er hetta als ikki óhugsandi.

Kyndil skal eisini helst vinna dystin, tí tapa teir sunnudagin, so kunnu teir enda við at vera fýra stig aftan fyri strandingar, og so er munurin í so stórur upp til annað plássið, sum gevur atgongd til FM-finaluna.

Neistin-H71:

## Bæði ætla sær longur fram

**Bæði Neistin og H71 hava brúk fyri sigrinum fyri at koma longur fram eftir stigatalvuni, tá liðini møtast í Atlantic Airways deildini sunnudagin**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Gongdin hevur ikki verið tann allarbesta í hesum kappingarárinum hjá Neistanum og H71. Undan innanhýsis dystinum sunnudagin liggja tey á ávikavist 5. og 6. plássi, og tí verður lagt upp til eitt brak í botninum henda dagin.

Gongdin hjá Neistanum hevur ikki verið serliga góð síðstu dystirnar, og í seinastu sjey dystunum hava teir bert fingið eitt stig, sum teir fingu síðsta vikuskiftið í Vestmanna.

Hjá hoyvíkingum hevur heldur ikki gingið heilt eftir vild, men í endaspælinum hava úrslitini verið á eini leið. Í fyrstu fýra dystunum hava teir fingið trý stig, og vinna teir dystin á Neistanum, so kunnu teir sleppa av aftasta plássinum, og kanska blanda seg uppí stríðið um heiðursmerki.

Hesi bæði liðini hava møtt hvørjum øðrum tvær ferðir fyrr í ár. Fyrsta dysturin var í høllini á Hálsi, og her vann Neistin tryggan sigur, men í seinna dystinum var H71 oman á. Hesa ferð vunnu teir trygt, og tí kunnu áskoðararnir vænta ein spennandi dyst sunnudagin.

KÍF-StÍF:

## Sigur er krav hjá kollfirðingum

**Um kollfirðingar ætla sær í FM-finaluna, so skulu teir helst vinna dystin á strandingum sunnudagin. Vinnur StÍF hinvegin dystin, so verður munurin f´rya stig, og so sær svart út hjá KÍF**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Stríðið um seinasta plássið í FM-finaluni bleiv víðopið síðsta vikuskiftið, tá strandingar taptu fyri Kyndli. Nú eru bara tvey stig frá KÍF og Kyndli upp til StÍF á øðrum plássi, og tí sær alt út til at kunnu henda.

Hetta vikuskiftið kann kappingin um annað plássið gerast enn harðari. Sunnudagin tekur KÍF nevniliga ímóti StÍF, og vinna kollfirðingar dystin, so kunnu teir leggja seg undir liðina á StÍF á stigatalvuni.

Gongdin hjá KÍF hevur eisini verið avbera góð síðstu dystirnar. Enn hevur KÍF ikki roynt at tapt í endaspælinum, og av fyrstu fýra dystunum hava teir vunnið tveir og spælt tveir javnar.

Hjá StÍF hevur hinvegin ikki gingið so væl síðstu dystirnar. Teir hava gaman í fingið fýra stig í endaspælinum, men síðsta vikuskiftið vann Kyndil ein tryggan sigur á teimum inni á Skála, og hetta gav Kyndil nýggjar vónir um at røkka til FM-finaluna.

### Fáa vit enn ein javnleik

KÍF og StÍF møttu hvørjum øðrum tvær ferðir í grundspælinum, og ikki kann sigast annað enn, at liðini vóru serstakliga samd.

Fyrri dysturin var í Kollafirði. Her leikaði javnt á at kalla allan vegin, og at enda samdust liðini eisini um javnleikin.

Eisini í seinna dystinum leikaði javnt á, men tá KÍF legði seg á odda við 10 sekundum eftir á klokkuni var okkurt, sum bendi á, at KÍF fór at vinna dystin. StÍF gjørdi tó skjótt av. Teir fóru í álop, og í seinasta sekundinum syrgdi Finnur Hansson fyri, at teir fingu javnleikin.

Sostatt eru báðir undanfarnu dystirnir millum hesi feløgini endaðir við javnleiki, og nú er spurningurin, um nakað av teimum fer at megna at bróta javnstøðuna.